tíðindablaðið

Leysasøla: 6,- kr.
65. árg.

sosialurin

frælsi
javnaður
brøðralag

5 ferðir um vikuna

Nr.190. ★ mikudagur 7. oktober 1992

# PENGARNIR BJARGAÐIR

*Fólk fingu rættiligan skelk, tá tað í gjár frættist, at krepputoysn máttí til fyri at bjarga Sjóvinnubankanum og Føroya Banka*



Fólk fóru algoyst í at kalla allar peningastovnarnar at finna útav, hvussu vorðið var við teirra peningi, nú krepputoysnin hjá bankunum kom. **Myndir: Kalmar**

# SKELKUR




SÍÐURNAR 3, 5, 6 & 7

## IKKI ALLIR RAKTIR AV NÝGGJU KREPPISTØÐUNI:

# Sparikassin og Fossbankin fríir

*– Danska bankaeftirlitið hevði ongar viðmerkingar til Fossbankan, tá tað var her í august mánaði, sigur Helgi Fossádal, stjóri í Fossbankanum. – Eg havi onga viðmerking, fyrr enn eg havi sett meg nærri inní, hvat hent er, sigur stjórin í Føroya Sparikassa, Eyðun á Rógvu Olsen. – Sparikassarnir eru ikki í somu støðu sum hinir, sigur stjórin í danska bankaeftirlitinum, Eigil Mølgaard*

Tað er einki, ið bendir á, at Fossbankin, Føroya Sparikassi, Suðuroyar Sparikassi og Norðoya Sparikassi verða raktir av kreppustøðuni, Sjóvinnubankin og partvís eisini Føroya Banki eru komnir í nú.

Sjóvinnubankin er settur undir umsiting og skal hereftir stýrast av einum serligum grunni, ið verður settur av donsku stjórnini og føroyska landsstýrinum, ið velja ávikavist tríggjar og tveir limir í leiðsluna fyri grunnin.

Samstundis verða settar upp til 500 milliónir krónur í Sjóvinnubankan.

**Føroya Banki fær eisini**

Ein upphædd, ið svarar til 250 milliónir krónur, verður somuleiðis sett í Føroya Banka.

Hesi tíðindi bar ikki til at fáa váttað í Føroya Banka í gjár, men sera álítandi bankakeldur søgdu fyri Tíðindablaðnum Sosialinum fyrrapartin í gjár, at móðurbankin hjá Føroya Banka, Den Danske Bank, fer at seta 250 milliónir krónur til, fyri at Føroya Banki eins og Sjóvinnubankin skal sleppa undan at fara á húsagang við árslok.

– Tá danska bankaeftirlitið var her uppi í august mánaði, vóru teir eisini hjá okkum her í Fossbankanum og hugdu at støðuni, sigur stjóri Fossbankans, Helgi Fossádal. – Aftaná at hava sæð alt, høvdu teir ongar viðmerkingar til raksturin. Tað sigur í hvussu er okkum so mikið sum tað, at her er alt, sum tað skal vera, og at Fossbankin er ein tryggur og álítandi banki, ið er staddur á rættari leið.

Heldur ikki hevur danska bankaeftirlitið havt nakrar serligar viðmerkingar til raksturin hjá føroysku sparikassunum, ið verða riknir eftir einari gamlari sparikassalóg, ið ikki loyvir teimum at leggja so nógv fyri, at teir kunnu koma í somu støðu sum Sjóvinnubankin og Føroya Banki.

Tíðindablaðið Sosialurin royndi í gjár at fáa eina viðmerking frá øðrum av stjórunum í Føroya Sparikassa, Eyðuni av Rógvu Olsen, men hann segði seg ikki kunna úttala seg, fyrr enn hann hevði sett seg nærri inn í tað, ið nú er hent.

Stjórin í danska bankaeftirlitinum, Eigil Mølgaard, vil ikki fara út í smálutir viðvíkjandi føroysku peningastovnunum, men hann váttar kortini óbeinleiðis, at teir føroysku sparikassarnir eru so illa fyri sum teir báðir stóru bankarnir, Sjóvinnubankin og Føroya Banki.

**Kann ikki úttala seg**

– Eg kann ikki úttala meg um teir einstøku peningastovnarnar, men eftirsum sparikassarnir virka eftir einari gamlari sparikassalóg, ið ikki loyvir teimum at taka so stórar kjansir, sum aðrir bankar kunnu, eru teir av góðum grundum ikki so fyri, sigur hann.

– Hinvegin so er tað ikki so lætt hjá Sjóvinnubankanum og Føroya Banka at virka, tá samfelagið alt verður ávirkað av konjunkturinum, so tí er ilt at siga, um teir kunnu gera so nógv við støðuna, ið nú er íkomin.

Eigil Mølgaard vil ikki beinleiðis viðmerkja støðuna hjá Føroya Banka, men váttar, at bankaeftirlitið tó hevur verið og hugt at Sjóvinnubankanum.

*Er tað upp á tal at nakar av føroysku peningastovnunum hevur brotið bankalógina, nú støðan er vorðin, sum hon er?*

– Nei, tað er ikki upp á tal, at bankalógin er brotin av nøkrum føroyskum peningastovni, sigur Mølgaard.

– Tað hevur bara ikki verið so einfalt hjá bankunum at klára skerini, sum gongdin allastaðni hevur verið, og tað gerst nokk einki við tað. Her er ikki talan um nakað lógarbrot ella líknandi.

**hj.**



*Stjórin í Føroya Sparikassa hevur onga viðmerking til støðuna, fyrr enn hann hevur sett seg meira inní, tað sum er farið fram innan bankaheimin síðani mánakvøldið.*

## HELGI FOSSÁDAL, FOSSBANKIN:

# Nú verður tað meira róligt

– Tað er sjálvandi harmiligt, alt hetta, ið nú hendi, men ein kann bert vóna, at tað kemur burturúr, at fólk aftur fær álit á føroyska peningamarknaðin, tí tað er so sanniliga tiltrongt nú.

Orðini eigur stjórin í Fossbankanum, Helgi Fossádal.

Hann vísir á, at verandi gongd ikki kundi hildið fram sum var, og at funna loysnin hóast alt man vera tann frægasta fyri at fáa loyst konsolideringstrupulleikarnar.

– Innskotið, ið nú kemur, bjargar støðuni nú, og vónandi verður hetta við til at skapa ta ró, ið má til á peningamarknaðinum, og sum øll hava brúk fyri, eftir at tað kanska hevur verið heldur ótrygt, sigur Fossbankastjórin.

Meðan nógv fólk í gjár leitaði sær til hinar bankarnar ella ringdi og spurdi, hvørja lagnu teirra peningur nú fór at fáa, so var ikki tann stóri stormurin í Fossbankanum á tí økinum.

– Her hava verið einir tveir ella tríggir kundar og spurt, um peningur teirra er tryggur, sum hann stendur her. Tað er alt, sigur Helgi Fossádal.

**hj.**




*Fossbankin er yngsti peningastovnurin, men er tó ein vælkonsolideraður banki.*

*Tjóðbankin bjargar Sjóvinnubankanum:*

# Og landstýrið fær harðar treytir

*Danski tjóðbankin setur pening í Sjóvinnubankan, treyta- av at landstýrið fylgir eini fíggjarpolitiskari "stabiliseringsætlan" sum skal gerast av útlendskum IMF fíggjarserfrøðingum*

Týsnáttina varð avtala gjørd milum landstýrið og donsku stjørnina, sum inniber, at danski tjóðbankin skal tilføra Sjóvinnubankanum 500 milliónir. Treytin fyri at hetta verður gjørt er, at landstýrið skal fylgja eini fíggjarpolitiskari stabiliseringsætlan. Hendan ætlan skal gerast eftir altjóða reglum fyri endurreising og hon skal gerast innan fimm mánaðar. Ætlanin skal gerast av óvildugum fíggjarserfrøðingum, sum verða læntir frá IMF altjóða gjaldoyrisfelagskapinum.

Ein treytin er, at javnvág skal vera í fíggjarlógini fyri komandi ár.

Landstýrið skal eisini hjálpa til við eini nýmótansgerð av føroysku vinnulívslógini, herundir eisini banka, partafelags og grannskoðaralógini.

## 500 milliónir

Danski tjóðbankin skal læna Sjóvinnubankanum í fyrstu atløgu 300 milliónir krónur. Peningurin verður útskrivaður í vekslum uppá seks mánaðar. Upphæddin kann eftir avtalu millum ríkisstjórnina og tjóðbankan hækkast við 200 milliónum. Fyri hesum peningi verður veitt statsgaranti.

Penigurin verður settur í ein grunn. Hesin grunnur verður stýrdur av fimm limum, danska stjórnin velur tríggjar limir, landstýrið tveir. Grunnurin setur nýggjan kapital í Sjóvinnubankan.

Tað var danska bankaeftirlitið, sum slerdi til. Sjóvinnubankin kom at hava hall, tá árið er av, so stórt, at eginkapitalurin var í vanda.

Nýggja skipanin merkir, at tey, sum eiga partabrøv í Sjóvinnubankanum koma at missa pening. Eginpeningurin verður niðurskrivaður frá 98 milli-ónum til 15 milliónir.

**jústinus**

STATSMINISTERIET DATO 6. OKTOBER 1992

Der er mellem den danske regering og det færøske landsstyre indgået følgende aftale:

1. Nationalbanken rediskonterer landsstyreveksler for 300 mio.kr. udstedt til de færøske pengeinstitutter. Vekslerne har en løbetid på 6 måneder. Beløbet kan efter aftale med regeringen og Nationalbanken forhøjes med 200 mill.kr.
2. Der ydes statsgaranti for landsstyrevekslerne.
3. Landsstyret og Investeringsfonden for Færøerne foretager kapitalindskud i en nyoprettet fond på 500 mio. kr.
4. Aktiekapital i Sjóvinnubankin nedskrives til 15 mio. mod nu 98 mio.
5. Fonden indskyder ny kapital i Sjóvinnubankin. Fonden afgør fremtidig stemmefordeling og eventuelt fordeling mellem aktiekapital og ansvarlig kapital.
6. Fonden ledes af en bestyrelse på 5 medlemmer. Regeringen udpeger 3. Landsstyret udpeger 2.
7. Ved forfald af vekslerne fra Landsstyret indtræder staten som långiver.
8. Landsstyret opstiller et realistisk finanslovforslag med balance mellem indtægter og udgifter for 1993. Endvidere følger Landsstyret et økonomisk-politisk stabiliseringsprogram. Dette program udarbejdes efter internationale standarder for genopretningsprogrammer inden 5 måneder. Det udarbejdes af uvildige økonomer, der udlånes af IMF, og som godkendes af de færøske og danske myndigheder. Landsstyret medvirker til en modernisering af den færøske erhvervslovgivning, herunder bank-, aktieselskabs- og revisorlovgivningen.
9. Staten indtræder kun, jfr. punkt 7, såfremt de efter punkt 8 anførte foranstaltninger er gennemført.
10. Nationalbanken diskonterer vekslerne til diskonto.
11. Statslånet forrentes med diskonto. Løbetid 5 år med tilbagebetaling i lige store årlige rater.
12. Ved misligholdelse af nationalbanklån eller statslån vil der blive foretaget modregning i bloktilskud.
13. Nærværende aftale er betinget af, at der er politisk tilslutning i Danmark til de nødvendige aktstykker og lovændringer.
14. Nærværende aftale er betinget af, at der er politisk tilslutning på Færøerne til at gennemføre den nødvendige lovgivning.

*Her er avtalan millum donsku stjórnina og føroyska landstýrið*




*Nýggja kreppuloysnin til tess at bjarga Sjóvinnubankanum merkir, at eginpeningurin verður niðurskrivaður frá 98 milliónum til 15 milliónir*



*Gunnar Justinussen, 26 ár, elektrikari:*

# Fekk eitt sjokk

*–Eg var bangin fyri at missa alt eg átti í Sjóvinnubankanum, sigur hann*



*Her stendur Gunnar við brævinum, sum veitir trygd fyri hansara peningi í Sjóvinnubankanum*
**Mynd: Kalmar**

Gunnar Justinussen í Havn eigur eina bankabók í Sjóvinnubankanum. Hendan bókin er uppá 12 mánaðar uppsøgn og her stendur ein partur av sparipeninginum hjá G Gunnari.

Týsmorgunin fekk Gunnar eina ordans útpurring:

–Ein svágur kom og segði mær, at bæði Føroya Banki og Sjóvinnubankin vóru farnir á húsagang. Eg óttaðist fyri, at tað, sum eg átti í Sjóvinnubankanum var rokin, eg ivaðist ikki eina løtu, sigur Gunnar Justinussen.

–Eg fór beina leið oman í Sjóvinnubankan, men har fekk eg at vita, at eg kundi ikki fáa eitt oyra út. Bankabókin hjá mær var uppá 12 mánaðar uppsøgn, so har var einki at gera. Eg kundi fingið ein kekk, men hvat skal ein við einum kekki frá einum banka, sum er farin á húsagang, sigur Gunnar Justinussen.

–Eg fekk eina váttan frá bankanum, at trygd var fyri peninginum og at eg kundu fáa hann út seinni um eg legði í. Hesum trúi eg, sigur Gunnar Justinussen.

*Hevði tú mist alt tú átti, um bankin var farin á heysin?*

–Nei, størsta uppsparingin hjá mær er í Sparikassanum, men tað hevði verið ein harður smeitur, sigur Gunnar Justinussen.

**jústinus**




# Stjórar, sherry og sorg í Sjóvinnubankanum

*Tað var einki lag á monnum, tá Sjóvinnubankin seinnapartin í gjár hevði stóra móttøku í sambandi við 60 ára føðingardagin. Og ætlaða veitslan verður neyvan nú…*

Seinnapartin í gjár bjóðaði Sjóvinnubankin til móttøku í høvuðsdeildini í Havn, har hópin av fólki var samankomin.

Blandingin av fólki var tann vanliga – leiðandi fólk innan føroyskt vinnulív, fólk úr føroyska mentanarlívinum, stjórar, reiðarar, formenn og onnur, ið hava nakað at siga í samfelagnum.

Øll kundu fáa sær sherry og kransakøku, og til teirra, ið ikki njóta rúsdrekka, var eisini skonkt juice.

Lagið var einki serligt á tolki, og tað var uttantað stóra hóvastákið, at menn tóku í hondina á hvørjum øðrum, stjóranum og nevndarlimum fyri at ynskja tillukku við tí runda degnum.

Heldur tvørturímóti var ein dapur stemningur innanveggja, og samveran minti meira um eina sorgarløtu enn eina roynd at halda føðingardag. Ikki var har ólíkt at vera í einum ervi.

## Veitslan av ongum

Og helst verður tað eisini til móttøkuna seinnapartin í gjár, at føðingardagshaldið í mesta lagi fer at strekka seg fyri fyrst.

– Vit høvdu ætlað at havt eina stóra veitslu leygarkvøldið í Badmintonhøllini fyri at halda 60 ára føðingardagin ordiliga. Men nú verður veitslan allarhelst útsett fyribils í hvussu langa tíð er, sigur Edvard Heen í Sjóvinnubankanum. – Í øllum førum er ikki akkurát tann allarbesti stemningurin fyri at halda veitslu júst nú.

Hvussu fór at verða við veitsluni, skuldi avgerast í gjár, men hon verður helst ikki.

At alt hetta skuldi henda júst nú, kom skilliga sera dátt við hjá teimum í Sjóvinnubankanum, og tað var helst eingin, ið hevði roknað við einum slíkum føðingardegi.

**jústinus & hj.**

*Atli Dam eftir torførar samráðingar í Keypmannahavn:*

# Eitt val millum pest og kolera

*-men einhvør kann ímynda sær, hvørja avleiðingar tað hevði fingið fyri føroyska samfelagið, um einum av bankunum stongdi segði Atli Dam, løgmaður við útvarpið í gjár í sambandi við ta avtalu, sum er gjørd millum danskar myndugleikar og landsstýrið um at forða fyri, at Sjóvinnubankin stongdi*



-Avtalan neyðug til tess at tryggja, at okkara banka- og fíggjarskipan ikki fór fullkomiliga av lagi, og tað er á tí grundstøði ein skal síggja avtaluna.

Atli Dam segði víðari við útvarpið, at hann er ikki nøgdur við alt í avtaluni, men hetta var so tað, sum í eini knappari vend varð møguligt at fáa upp at standa.

Avtalan hevur við sær, at bankaskipanin í Føroyum kann halda fram á fullkomilga tryggum støði.

Løgmaður vísir á, at hóast treytir eru settar í avtaluni, so eru Føroyar so avgjørt ikki settar undir fyrisiting. Her er talan um viðurskifti í sambandi við fíggjarlógina, sum landsstýrið fer at broyta umframt støðutakan til einum meira langsiktaðum lánipolitikki.

-Ein má tó siga, at bankaskipanin í Føroyum er sett undir ávísa fyrisiting, og harav fylgir nakrar avleiðingar fyri samlaða búskapin.

Talan er annars um at spara umleið 150 mill. kr. á fíggjarlóggini. Løgmaður heldur ikki, at tað kunnu fremjast stórvegis fleiri skerjingar. Talan verður um eina kombinatión av fleiri inntøkum og ávísa skerjing.

Løgmaður sigur, at í mun til tað, sum varð lagt á borðið undir torføru samráðingunum í Keypmannahavn til tess at bjarga Sjóvinnubanknaum, so er avtalan rættiliga munandi ørðvísi.

-Men tað er greitt, at hetta var eitt val millum pest og kolera, og tað kann einhvør ímynda sær, hvat hevði hent við tí føroyska samfelagnum, um ein av peningastovnunum stongdi.

Løgmaður heldur annars støðuna hjá vinnulívinum vera betri eftir tað, sum nú er hent.


# Vinnið FAMILJU-ÆVINTÝRFERÐ

fyri 2 vaksin & 2 børn

til

**EuroDisney®**

RESORT • PARIS

**Við SMYRIL LINE & PAPUQA-FERÐUM**

*ella onkran av hinum mongu og einastandandi vinningunum í*

**FØROYA BESTA**



– ið byrjar í SOSIALINUM eftir mánaðarskiftið sept./okt.

## Vissið tykkum øll bløðini – gerist haldarar

**JA!** *Eg vil tryggja mær **ØLL BINGO-BLØÐINI** og gerist haldari fyri oktober ársfjórðing '92 og fáið Tíðindablaðið SOSIALIN 5 ferðir um vikuna.*
*fyri 205 kr./ársfj. (haldarar í Føroyum)*
*fyri 240 kr./ársfj. (haldarar í Skandinavia)*

*Navn:* ____________________

*Bústaður:* ____________________

*Bygd / býur:* ____________________

*Land:* ____________________

Ókeypis
Sosialurin
rindar
postgjaldið

64

**Tíðindablaðið
Sosialurin,
Postboks 76
FR-110
Tórshavn**

Kannað postverkinum